**ÍBÚÐ Á OYRASUNDSKOLLEGIINUM**
í Keypmannahavn til framleigu frá 22. des. 04 til 01. feb. 05. Hevur allar hentleikar og liggur tætt við Metro, innkeypscentur og miðbýin.
*Anna, tlf. (+45)32886912 ella (+45)61710670*

**ÍBÚÐ/KAMAR**
ynskist til leigu í Tórshavn, Runavík ella nærhendis sum skjótast.
*Tlf. 271376 helst eftir kl. 18*

**HÚS/ÍBÚÐ YNSKIST**
Par við tveimum børnum ynskir hús/íbúð til leigu í høvuðsstaðarøkinum í seinasta lagi 1. jan. Vit eru eitt par við 2 børnum. Teldupostur slp-bn@post.olivant.fo
*Tlf. 322325 / 548020*

**VIT ERU EITT UNGT PAR**
Sum ynskja at leiga eina góða íbúð í Havn. Vinarliga ring skjótast gjørligt.
*Tlf. 573406 eftir kl. 16*

**VERILSIR Í KBH. TIL LEIGU**
2 verilsir í eini 3 verilsis íbúð. Áhugað ringið
*tlf. 212252/315885/ +45 27244430*

**KAMAR YNSKIST**
19 ára gomul genta ynskir kamar við atgongd til køk og bað. Helst ikki ov langt frá studentarskúlanum. Royki ikki.
*Tlf. 215653*

**TRENINGSHØLI SØKIST**
Vit fara væl um.
*Tlf. 506407*

**TIL LEIGU**
Núumvæld sethús í Hvalvík til leigu.
*Tlf. 229349 ella 315921 eftir kl. 18*

**EITT NEYÐARRÓP**
Ungt par við barni væl á veg – í november – søkja desperat eftir einari góðari og bíligari íbúð. Helst undir 4.000 kr. við øllum frá 1. des. ella fyrr. Íbúðin má liggja í Havnar umráðnum, men gjarna uttanfyri centrum. Ringið sum skjótast á
*tlf. 509991 ella 749991*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Edrúiligur maður søkir íbúð í Tórshavn.
*Tlf. 584567/318401*

**FRIÐARLIGUR**
27 ára gamal maður søkir íbúð í Tórshavn. Havi fast arbeiði, fari væl um og gjaldi til tíðina. Send teldupost til torshavn@gmail.com ella
*ring 273859*

**ÍBÚÐ TIL SØLU Í HVIDOVRE**
42 fermetrar, 1 ver. íbúð til sølu, liggur við síðuna av Rødovre station og kollegium, vælegnað til lesandi.
*Tlf. 423149*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Røkin, friðarlig og álítandi kvinna við 3 børnum søkir íbúð í Havn.
*Tlf. 227951*

**JÓLAFERIA Í REYKJAVÍK**
Íbúð til leigu frá 17. des. til 3. jan. 2005 miðskeiðis í Reykjavík.
*0035 45621737/0035 48641736*

**TIL EITT FRIÐARLIGT FÓLK**
í fer væl um (ikki roykjari) er eitt kamar til leigu í Gøtu. Egin inngongd.
*Tlf. 0045 21260418*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Vit eru 2 gentur, sum ganga í skúla á Kambsdali, ið høvdu verið fegnar um at fingið eina íbúð til leigu á Toftum ella í Runavík. Vinarliga ring
*tlf. 254195/250277*

**ÍBÚÐ Í KBH TIL LEIGU**
Frá 1. nov. og uml. 2 mánaðir fram. Til friðarligan og ábyrgdarfullan persón.
*Tlf. 313474*

**ÍBÚÐ YNSKIST!**
Mamma við tveimum børnum ynskir íbúð við teimum kømurum í Havn skjótast møguligt. Max. 4.500 kr. pr. mðr. v/ ljós og hita. Fara væl um og gjalda rættstundis.
*Tlf. 223339*

## Dansur

**JÓLADANSUR Á GILJANESI**
Góður jóladansur við All That Rain, verður í høllini á Giljanesi 2. jólakvøld. Bussar koyra.
*FS Vágar Stuðlar*

## Dýr

**KETTA/FRENSUR**
Svørt og hvít ketta/frensur, hvítar labbar, hevur tumlar, spøk, uml. 1/2 ára gomul komin at ganga í Gerðinum í Vestmanna. Sigst komin út í Gerðið helst innan úr bygdini um vikuskiftið. Kennast tit við hana vinarliga ring
*tlf. 424089*

**AKVARIUM 660 L**
2,0 x 0,55 x 0,60 m. v/ fiskum og øllum tilhoyri. Til sølu fyri 4.000,- kr.
*Tlf. 580262*

**MARSVÍN**
Eitt hálvvaksið hann marsvín til sølu. Hann er svartur, gráur og hvítur, langhærdur og sera vakur.
*452081 ella 262329*

**MARSVÍNAUNGAR**
Tríggir langhærdir marsvínaungar til sølu. Ein reyð og hvít hon, ein myrkabrúnur, reyður og hvítur hannur við krúnu og ein gráur/-brúnur og hvítur hannur.
*452081 ella 262329*

**TIL SØLU**
2 mðr. gamal tarvskálvur til sølu.
*Tlf. 218101, Velbastað*

**TIL SØLU**
Ein ektaður seyðahundur av tí góða føroyska slagnum til sølu. Átta vikur gamal. Foreldrini eru heilt góðir seyðahundar, sum fleiri mans á fjalli.
*580472*

**EIN KANINUNGI**
Fæst við at heinta hann. Ring
*Tlf. 315942 ella 213736*

**PUDDILHVØLPUR YNSKIST**
Hava tit ein tíkarhvølp til okkum, so ring
*tlf. 211632/317905*

**BORDER COLLIE**
tíkarhvølpar av góðum seyðahundaslag, fáast til keyps við at ringja
*tlf. 456154*

**UNDULÁTUR**
til sølu fyri 200 kr.
*Tlf. 271723*

**HUNDAHVØLPUR!**
verður latin djóravini. 5 mán. gamal av blandaðum slag. Reinligur, góðlyntur og vanur við børn.
*Tlf. 318975*

**KETTLINGUR**
Kettlingur (svartur/hvítur/ketta) fæst við at ringja
*tlf. 421527/313260, Johnsson*

**KETTA YVIRKOYRD**
26. okt. sá eg eina reyða og hvíta kettu við myrkum hálsbandi blíva yvirkoyrda niðanfyri landsbókasavnið. Kennist tú við hana?
*ring 267224*

## Fundir

**PENSIONISTAFELAGIÐ Í HAVN**
hevur fund í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøldið 10/11 kl. 19.00. Vit fáa vitjan av pensionistaholdinum á Føroya Fólkaháskúla.
*Pensionistafelagið í Havn*

## Húsarhaldstól

**DAMPMASKINA TIL SØLU**
Kann nýtast til m.a. høvuðsreingering, jakkasett, møblar, o.s.fr. Nýtt einaferð!!!
*Tlf. 510056*

## Innbúgv

**TIL SØLU**
Ein ljós nistrut brúnlig hornasofa úr stoffi til sølu fyri 800 kr. Ring
*Tlf. 314473 ella 229101*

**TIL SØLU**
Barnasong við trappu, skrivaraborði og madrassu, stødd 190x70, í góðum standi fyri 400 kr.
*Tlf. 448166*

**TIL SØLU**
Borð og 4 stólar úr træ bíliga til sølu.
*Tlf. 447160*

**TIL SØLU**
Leðursofur 3-2 pers. nýprísur 11.000,- fáast fyri bert 5.500,- vegna flyting (svartar – sum nýggjar).
*Tlf. 583388*

**TIL SØLU**
Sofaborð 150 kr. Træ køksborð 400 kr. Trædiskur 500 kr. Stovuborð 12 pers. 700 kr.
*Tlf. 583388*

**TELDUBORÐ TIL SØLU**
2 telduborð til sølu, kr. 200 pr. stk., kr. 300 fyri bæði. 2 Standilampur við lesilampu til sølu, kr. 250 pr. stk., kr. 400 fyri báðar.
*Tlf. 522120*

**SOFA**
2 mans sofa 71 x 123 ikki leður, til sølu fyri 300 kr.
*Tlf. 271723*

**INNBÚGV TIL SØLU**
Frystiskáp 400,-. Køksborð 400,-. Stólar 50,- pr. stk. Reol 200,-. WC-skáp 200,- pr. stk.
*Tlf. 227710*

**HORNASOFA**
lenistólur sum kann vippa og snara og fótskammil. Alt settið til sølu fyri 4.500 kr.
*Tlf. 319917 ella 519917*

**SONG TIL SØLU**
Song úr kirsuberjatræi 140 x 200 til sølu fyri kr. 2000,- Keypt úr Idé Møblum.
*Tlf. 322263*

**TIL SØLU**
Ein song 90 x 200 við elevationsbotni og madrassu til sølu.
*Tlf. 444397 ella 744397*

## Leikur

**LEIKUR TIL SØLU**
Posar v/ ymiskum leikum til sølu fyri bert 10,- og 20,- kr. vegna flyting.
*Tlf. 583388*

**LEIKUR YNSKJAST**
s. s. skutari, skreiðibani, bilar, gravimaskinur, chau chau dukkur, babyborn dukkur og dukkustólar.
*Tlf. 457144*

## Lutaseðlar

**LUTASEÐILIN**
Sum skuldi dragast 11. nov. er útsettur at vera 18. nov. 2004. Basarurin verður eisini 18. nov.
*KFUK, Varðagøta 9*

**FRÁ FS-VÁGUM**
Vinnarin av tarvamykjukappingini var nr. 387. Tarvurin fæst við at venda sær til.
*Tlf. 333410*

**DEYVAFELAG FØROYA**
3. november 2004 vórðu hesi tøl drigin á Girokortinum hjá Deyvafelag Føroya:
1) 93847 2) 5741 3) 190227
4) 199671 5) 157410 6) 69258
7) 167038 8) 15765 9) 166739
10) 121497 11) 41475 12) 142947
13) 16103 14) 172573 15) 133559
16) 88363 17) 181035 18) 170045.
Takk fyri góðan stuðul
*Deyvafelag Føroya, tlf. 317597*

**UNGDÓMSARBEIÐIÐ HJÁ HMU**
Vinnaratølini fyri lutaseðlarnir fyri ungdómsarbeiðið hjá Heimamissiónini (HMU).
Nr. 1. 6285. Nr. 2. 6338. Nr. 3. 6355. Nr. 4. 4260. Nr. 5. 4523. Nr. 6. 7411. Nr. 7. 4125. Nr. 8. 7402. Nr. 9. 4588. Nr. 10. 6885. Nr. 11. 4561. Nr. 12. 5068. Ert tú ein av hepnu vinnarunum, so send okkum vinnaraseðilin við fullari addressu til: Heima Missións Ungdómur, 437 Nesvík
*Tlf. 587070*

## Matur

**GAMAL HAVHESTUR**
kann bíleggjast royttur og sviðin. Verður koyrt til hurðina, 35 kr. pr. stk.
*Tlf. 225781/507313*

**KROV**
kunnu bíleggjast
*á tlf. 444847/214847/270899*

**GÆS**
Grýtuklárar gæs og avroð til sølu.
*Tlf. 421094*

## Pløgg

**BRÚÐARKJÓLI**
av merkinum Lilly, std. 36, og skjúrta til brúdgommin, std. 40, til sølu fyri 2.500 kr.
*Tlf. 315969/225558*

**EITT »PAU«SETT TIL SØLU**
Hvítt »Slå om« troyggja og brúnur niðurdeilur. Bert 550 kr. Nýprísur var 1.300 kr. Ring
*Tlf. 310734 eftir kl. 17.00*

**TIL SØLU**
Ein sera vakur brúðarkjóli til sølu. Stødd 38-40, brúktur 1 ferð, keyptur í Spanien.
*Tlf. 447160*

**TIL SØLU**
Graviditetsbuksur (nýggjar/cowboy) til sølu, kr. 350
*Tlf. 522120*

## Samband

**TÚ KVINNA**
sum eg møtti í Reyðakross bókahandli 18. sept. Tú vart áhugað í søguligum skaldsøgum. Tú keypti bókina sum Vigdis Hjort skrivaði. Eg eri tann maðurin, sum fann tvær bøkur til tín, men tú hevði lisið tær. Set teg í samband við meg. Skriva til Sosialin, box 76, 110 Tórshavn.
*Bill.mrk. 1953*

**MAÐUR UM 40-ÁRA ALDUR**
sóknast eftir kvinnu til intimt samband. Eri lættur av lyndi og vanligur í allar mátar. Tú ert minst 30 ár, men ikki meira enn 60 ár. 100% tagnarskylda. Skriva eitt sindur um teg sjálva á
*583550*

**SAMBAND YNSKIST**
Eg vil fegin koma í samband við eina kvinnu, sum eg kann líta á. Um tú ert einkja ella fráskild ger mær tað sama. Tú skal fáa tað gott, so skriva endiliga, 100% tagnarskylda. Skriva til Sosialin, box 76, 110 Tórshavn.
*Bill.mrk. 1951*

## Sjavs

**SJAVSKAPPING**
Verður í húsum felagsins í Torvgøtu 10. nov. kl. 18.45.
*Eldrafelagið Nón*

**SJAVSKAPPING**
verður á Svangaskarði mánadagin 8. nov. kl. 18.30.
*Tofta Ítróttarfelag*

**FRÁ TÓRSHØLL**
Sjavskapping verður mánakvøldið 8. nov. kl. 19.00. Øll eru vælkomin.
*Tórshøll*

**SJAVS**
Sjavskapping verður leygardagin kl. 16.00.
*NSÍ*

## Súkklur

**APRILIA RX50**
við alufelgum í fínasta standi. Koyrt 4700 km. Nýggj Juni 2003. 25000 kr. Nú: 17.900 kr.
*Tlf. 220380 421326*

**SKUTARI TIL SØLU**
2 ára gamal bláur Yamaha Aerox skutari til sølu. Skutarin er sera væl viðfarin. Ring og spyr eftir
*Angelicu, tlf. 251025*

**APRILIA RX 50**
Til sølu vegna bilkeyp. Bert koyrt 3.000 km. Prísin tosa vit um. Ring
*Tlf. 256878 Tummas*

**SKUTARI TIL SØLU**
Gott 2 ára gamal Hussar skutari til sølu fyri 6.000 kr. Ringi
*Tlf. 214955*

**SKUTARI TIL SØLU**
Derbi Predator, vatnkøldur, 50 cc, 7 HK, árg. okt. 01, koyrt knapt 9.000 km, ongan skaða havt og er í góðum standi. Prísuppskot 14.000 kr.
*Tlf. 371643*

**MOTORSÚKKLA TIL SØLU**
Yamaha RS 125 í hampuligum standi. Árg. '86. Nýsýnað, men skal skifta forskerm. Nýggj dekk og nýtt seturbetrekk. Ymiskir eykalutir fylgja við. Prísuppskot 9.500,- kr.
*Tlf. 319618*

**TIL SØLU**
Aprilia RS50 ´99 hevur koyrt 5100 km. Manglar útstoyt og innsúgving. Boð undir 10000 kr. ongan áhuga.
*Tlf. 255178*

**SÚKKLUR TIL SØLU**
DBS Apache v/ 3 gearum kr. 300,- og ein Mountain Bike v/ 10 gearum kr. 300,-
*Tlf. 228367*

**DREINGJASÚKKLA TIL SØLU**
Næstan óbrúkt dreingjasúkkla til 5-7 ár til sølu fyri 600 kr.
*Tlf. 256495*

## Teldur

**FARTELDA**
Ein Vega+ 2.0 MHz, 512MB DDR RAM 30GB HDD, Combo DVD/CD-RW. windows xp. sera góð til skúlabrúk til sølu fyri bert 7.000
*Ring 583636 (Klax)*

**FARTELDA**
Dell Inspiron 8600 15,4" widescreen (1680x1050) 1,7 GHZ centrino, 512 ram, Geforce 128 mb ram grafikkort, 60 GB hardisk, LAN, WLAN, 56k modem, DVD-brennari, firewire, USB 2.0, windows xp pro + onnur forrit. 9 mðr gomul sera vælhildin. 10.000,-
*Tlf. 223573*

**HEY**
Er tað nakar, ið vil keypa eitt Playstation 1 við uml. 24 spølum, memorykorti og 2 joystikk fyri minst 2.000 kr.
*Tlf. 503001*

**EIN PS2 TIL SØLU**
2 joystikk, 1 memorykort og 6 spøl: Wild wild racing, WRC II Eztreme, The Getaway, NES underground, GTA Vice city og Hitman contracts. Ring og gev eitt boð.
*Tlf. 264534*

**TELDA**
Brúkt kontórtelda ynskist til keyps.
*Tlf. 312271*

**TIL SØLU**
Telduskermur + tastatur + 2 hátalarar og ein mús, 3 ára gamalt 1.500 kr.
*Tlf. 250081*

**GÓÐ TELDA TIL SØLU**
AMD 2400+, 1GB DDR Ram, 73GB, GeForce FX5600 256MB Ram, Netkort, CD og DVD rom, 17" skermur, hátalarar, tastatur og mús. Windows XP og Microsoft Office er á telduni. Nýprísur 13.249 kr. Til sølu fyri 6000 kr.
*Tlf 252745, helst aftaná kl. 16*

**MAXTOR HARDDISKUR**
Diamond Max Plux 9 120 GB ATA/133 HD Made in US. Óbrúktur til sølu fyri 800 kr.
*Tlf. 314130/251030*

**GÓÐ TELDA TIL SØLU**
Pentium 3 930 MHz, 75 GB, 512 MB Ram Geforce3–19" skerm, modem, netkort, Win XP Pro, Office XP, nógv spøl, telduborð fyri 4.000,-
*Tlf. 580174*

**USB 2 FLASHPENNUR 512 MB**
til sølu fyri 1200 kr. Compac Flash Xtreme (high speed) 512 MB fyri 1200 kr. Compac Flash 256 fyri 600
*Tlf. 269294*

**PS2**
spøl til sølu: TCM 2004, Dogs Life, Conflict Desert storm, Manhunt, M12, 350,- kr. pr. stk. Ella øll fyri 1500,- og eitt joystick fyri bert 100,-
*Tlf. 250308*

## Tónleikur

**KASSAGITTARI TIL SØLU**
Ein Cort. CJ-5X við kassa til sølu. Gittarin er 7 mánaður gamal. Ring og hoyr nærri á
*Tlf. 225702*

**BÍLIGT PIONEER TIL SØLU**
(DEH-P9400MP) bilanlegg sum spælir mp3/wma/cd við fjarstýring. 3 forsterkarar. og 2 600w sub. 2 hátalarar á 360 watt og 2 á 220 watt. Leidningar. Klárt at seta í bilin. Til sølu fyri bert 10.000 kr.
*Tlf. 583636 (klax)*

**TIL SØLU**
2 el-guitarar, 2 forsterkarar og 1 pedal. Prísuppskot 6.000 kr. Tú kanst eisini geva eitt annað boð og sjálvandi er eisini møguleiki at royna útgerðina.
*Tlf. 423270 ella 224759*

**STÓRT ANLEGG TIL SØLU**
Tecnics forsterkari 4 x 220 w, Technics cd-spælari og technics equalizari, 2 Dali 909 hátalarar 500 watt stk. og 2 Pioneer hátalarar 125 watt stk. 3 ára gamalt, nýprísur 22.000,- til sølu fyri 12.000,-
*Tlf. 264534*

**EL-YAMAHA GUITARI**
(Nýprísur 12.000 kr.) selist nú fyri 4.500 kr. við tasku. Boss turbo distortion pedal (Nýprísur 1100 kr.) selist nú fyri 500 kr. Lítið brúkt. Ring eftir kl. 15.
*Tlf. 253009*

**KAWAI ORGUL**
bíliga til sølu.
*Tlf. 332165/229865*

**BILANLEGG TIL SØLU**
Pioneer anlegg, forsterkari 2x100 w, tveir 200 w hátalarar, discbox til 6 fløgur, allir leidningar eru við. Til sølu fyri 3.000,-
*Tlf. 224998*

**AVHEINTA**
Gott orgul fæst við at avheinta tað.
*Ring 253402 eftir kl. 17*

**TRUMMUSETT**
1 ára gamalt Pearl EX trummusett til sølu. 8, 10, 12, 14 og 16" tammir. 22" basstrummu. 2 bekkarastativ, 1 hi-mat stativ og basstrummupedal. 7.000,- fyri alt. Farva: Mirror Chrome.
*Tlf. 268339*

**GUITARI**
ynskist til keyps.
*Tlf. 319911 eftir kl. 17*

**JAMO-GULVHØJTALERE D870**
High End 3 vejs Basrefleks 200 W. Freq 30-22000 vægt 32,5, stk. Som nye
*Tlf. 271827*

## Út- & Sjónvarp

**PANASONIC BILANLEGG**
til sølu, 3 linjuútgangir, spælir cd, mp3 og wma. Hevur sera flottan skerm, alt lýsir blátt, hálvt ára gamalt. Nýprísur 9.000,- til sølu fyri 5.000,-
*Tlf. 264534*

**GRUNDIG 28" SJÓNVARP**
silvurgrátt, til sølu vegna flyting. 1 1/2 ár, nýprísur kr. 12.000, selist fyri kr. 5.500,-.
*Tlf. 373360 ella 261138*

**BILRADIO**
við fløguspælara, merki Sony CDXø5000R 50 WX4 til sølu fyri 500,- riggar fínt.
*tlf. 580174*

**32" WIDESCREEN**
sjónvarp til sølu fyri 12.000 kr. við VGA inngangi. Sjónvarpið er ca 1/2 ára gamalt og nýprísurin er 20.000 kr. Til sølu vegna flyting.
*Tlf. 224144*

**HEIMABIOGRAFUR**
DVD avspælari, 5 hátalarar + subwoofer spæla 200 watt tilsamans. Kann spæla DVD CD Mp3 osv. Til sølu fyri 2.200 kr.
*Tlf. 269294*

**PARABOL**
Móttakari av merkinum Amstrad analogur v/80 cm. parabolskál til sølu fyri kr. 300,-
*Tlf. 228367*

## Ymiskt

**EYDNUHJÓL**
Sunnudagin 14/11-04 kl. 16.00 verður eydnuhjól íÍtróttarhøllini í Vestmanna.
*V.Í.F.*

**FRÁ FØROYA FUGLAFRØÐIFELAG**
Hugnaløtan verður í Odd Fellow húsinum, Grønlandsvegur 56, leygardagin 13. nov. kl 19. Tilmelding á tlf. 316530 - 256370.
*Nevndin*

**JÓLA-CRUISE VIÐ NORRØNU**
Ferð fyri ein persón á 2 koyggjukamari til sølu fyri 600 kr. (Virði 1.000 kr)
*Tlf. 442233 ella 222085*



## VIÐMERKINGAR

# Støkkhøll ella svimjihøll

*Bill Justinussen*

Á veljarafundinum mikukvøldið kom fram, at Runavíkar Kommuna hevði fleiri kaninur, sum hálaðar vórðu upp úr hattinum. Ein av hesum var, at kommunan nú hevur ítøkiligar ætlanir um at keypa verandi Støkkhøll (Glyvra Bio) og soleiðis veita fimleikafelagnum Støkk ein fíggjarligan stuðul upp á millum 2 og 3 mió. kr. Hendan ætlan er okkum borgarum í kommununi spildurnýggj, men er helst ikki so nýggj fyri tey, sum hava arbeitt við málinum. Í einum spurningi til borgarstjóran fíltist eg á, at elligamla ætlanin um svimjihøll ferð eftir ferð tykist at dvína fyri øðrum ætlanum, sum altíð tykjast at vera meiri bráneyðugar. Eg vísti m.a. á, at vit í løtuni hava einar 4-5 fimleikarhallir í kommununi og at nú mátti túrurin verið komin til svimjihøllina. Tað kundi sjálvandi tykjast, sum at eg vendi mær ímóti ætlanunum um eina Støkkhøll, og tað vil eg fegin fáa loyvi til alment at afturvísa – tað slapp eg ikki á fundinum.

**Støkk**

Sjálvandi skal Støkk hava allarbestu umstøður at virka undir, tí felagið hevur havt ovurstóran týdning fyri trivnaðin í býnum í næstan hálvan mansaldur og hevur tað framvegis. Tað sigur ikki so lítið, at so at siga hvør einasta familja í býnum hevur tilknýti til felagið. Støkk hevur so at siga øll árini eisini verið eitt virkið kappingarfelag, og setir hetta støðugt nýggj krøv til nútímans umstøður. Tí er lívsneyðugt, at felagið fær nøktandi hølisumstøður, og taki eg sjálvsagt fult undir við hesi ætlan.

**Sjokk**

Men tað kom helst sum eitt lítið sjokk/skelkur fyri fleiri, at kommunan longu tykist meir ella minni at hava avgreitt málið, uttan at nøkur borgarakunning hevur verið yvirhøvur. Tí var tað ikki uttan grund, at eitt nú Regin Jacobsen vísti á týdningin av størri gjøgnumskygni við regluligum borgarafundum, so møguleiki er hjá okkum skattaborgarum at fylgja við og seta viðkomandi spurningar. Tað ber ikki til í einum framkomnum samfelag, at so lítið er at frætta um stórar avgerðir, sum fólkið hevur rætt til at kunnast um.

**Svimjihylur**

Og tað tyktist á fundinum, sum um at ætlanin um svimjihøll framvegis liggur í tí óvissa, hóast øll sýntu góðan vilja. Í skjótt farna valskeiði bar tað ikki til at byggja svimjihyl, tí bryggjukanturin skuldi útbyggjast og kommunan skuldi gera seg tilreiðar til oljuvinnuna. Eisini skuldi nýggjur barnagarður byggjast. Og nú stendur ein stór skúlabygging fyri framman umframt onnur projekt harímillum Støkkhøllin. Tí sær tað framvegis svart út fyri svimjihøll, og vit mugu helst brynja okkum við toli fleiri ár afturat. Í hesum ljósi taki eg tí undir við uppskotinum hjá Regini Jacobsen um, at langtíðarløguætlanin verður endurskoðað, raðfestingar verða gjørdar av nýggjum og borgararnir verða innkallaðir til kunningar, so øll fáa loyvi til at siga sína hugsan.

# Fólkaatkvøða á Tvøroyri um at leggja kommunur saman

**Á býráðsvalinum týsdagin, skulu tvørafólk eisini atkvøða um tey halda, at allar kommunurnar í Suðuroy skulu leggja saman í eina kommunu**

SAMANLEGGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tá ið tvørafólk týsdagin fara á val, skulu tey ikki bara velja nýtt býráð.

Tey sleppa eisini at atkvøða um, antin tey vilja hava, at allar kommunurnar í Suðuroy skulu leggja saman í eina kommunu.

Tað sigur Kristin Michelsen, borgarstjóri.

Hann sigur, at Tvøroyrar býráð hevur samtykt, at á býráðsvalinum týsdagin, skulu tvørafólk eisini sleppa at siga sína hugsan um kommunusamanlegging í Suðuroy.

Spurningurin, sum tvørafólk skulu svara til, er heilt einfaldur. Hann ljóðar soleiðis: Skal Suðuroyggin verða ein kommuna. Og so skal krosssur antin setast við »ja« ella við »nei«.

Tað ber væl til at hava eina atkvøðugreiðslu um kommunusamanlegging, samstundis sum býráðsvalið er, tí tá eru fólk á vali kortini.

Einasta treyt er, at greiður skilnaður er ímillum valini. Sostatt skulu tveir atkvøðukassar vera, eins og atkvøðuseðlarnir skulu hava hvør sín lit.

Tað er Sumbiar Bygdaráð, sum hevur mælt øllum kommunum í Suðuroy til at hava fólkaatkvøðugreiðslu sum kommunusamanlegging, samstundis sum kommunuvalið er, fyri at fáa greitt at vita, hvørja støðu, suðuroyingar hava til samanlegging.

Men enn er tað bara Tvøroyrar Býráð, sum hevur boðað frá, at tað tekur undir við hesum.

**APEX-FLOGFERÐASEÐIL**
Til sølu fyri 2.500 kr.
*Tlf. 312762 ella 226604*

**SUNDA PENSIONISTAFELAG**
Hugnakvøld verður í Eydnuni á Oyrarbakka mánakvøldið 8. nov. 2004 kl. 19.00.
*Nevndin*

**SOLARIUM TIL SØLU**
av merkinum Pedan, 20 rør 10/10.
*Tlf. 332165/229865*

**GASS**
vatnhitari bíliga til sølu.
*Tlf. 332165/229865*

**TAKRENNA**
2 stk. á 6 m. (óbrúkt) ljósagrá, rund við tilhoyri, bíliga til sølu.
*Tlf. 317564*

**GOTT TOMBOLA**
og kaffisøla verður í Glæmuni í Kvívík leygardagin 6. novembur kl 16 til frama fyri gøtubørn í Kiev. Eisini verða lutaseðlar seldir fyri 5 kr stk. Høvuðsvinningur er ein vikuskiftisflogferð frá Atlantic Airways. Skriva navn og tlf. á nittirnar og verð við i dráttinum um ein góðan vinning. Øll eru vælkomin.
*Sunnudagsskúlin*

**MARKNAÐARDAGUR**
verður í Ítróttarhøllini í Runavík 27. nov. Tilmelding á tlf. 447655.
*NSÍ*

**FRÁ KAGGANUM**
Ræstkjøtaveitslan fyri limum við maka verður í Kagganum leygarkvøldið 13. nov. kl. 19. Tilmeldingarlistin liggurí barrini. Gjaldast skal við tilmelding.
*Kaggin*

**DISCMAN**
Sony-Discman, brúktur eina ferð, til sølu fyri kr. 300.
*Tlf. 522120*

**BRENNIOVNUR TIL SØLU**
Tasso stoypijarns breniovnur at seta til oljufýring til sølu fyri 3.000,- kr.
*Tel. 315003 eftir kl. 17*

**KAPPRÓÐRARVEITSLA**
Verður í kappróðrarneystinum í Streymnesi leygarkvøldið 6. nov. kl. 20.00. Seinasta freist at keypa bilett er hóskvøldið 4. november kl. 19.00–21.00 í kappróðrarneystinum.
*H.S.R.*

**VENJINGARBONKUR**
framleiddur í Danmark, til sølu. Uml. 100 kg av vektum fylgja við. Ring og hoyr nærri.
*Tlf. 448323 el. 449185*

**YNSKIST**
Ein góð úthurð ynskist mát. 80x200 ca. ella okkurt ið er har um. Eingin rútur má vera í. Prís ca. 1000 kr.
*Ring 514717, Mourits*

**04Ð LOPPUMARKNAÐUR**
Vit savna inn til loppumarknað – bæði stórar og smáar lutir. Vinarliga ring um tit hava nakað.
*Tlf. 221108 ella 264070*

**103 VINNINGAR**
Send ABC til 1441 At vinna fartelda, fartelefonir, 25 ks. 1 1/2 ltr. Coca Cola, døgurðarættir, 20 før. røst krov, 5 Apex ferðaseðlar. Sí meira á portalinum.
*Bygarfelagið Báran í Árnafirði*

**HANDILSINNBÚGV TIL SØLU**
Vit hava handilsinnbúgv til sølu fyri sera lagaligan prís.
*P/f Valdemar Lützen, tlf. 317920 - Høgni Lützen*

**NIKON COOLPIX 3500**
Lítið brúkt digitalt kamera, 3,2M pixel vid ladara, 64MB Compact Flash, nýtt battarí, USB2 kort lesari (4 í einum). Í sera gódum standi, virkar perfekt. 2100 kr.
*Tlf. 314587*

**NADDODDUR**
Thailendskur matur leygarkvøldið 13. november kl. 19.30. Øll eru vælkomin. Tilmelding áðrenn 11. nov. á
*tlf. 371827*

**CANON IXUS 500**
Digitalt myndatól 5 megapixel 3x optiskt zoom. Fyllur sum ein cigaretpakki. Sera flott kamera. Til sølu fyri 4.500 kr.
*Tlf. 269294*

**FRISØRHJELMUR**
at heingja upp á veggin til sølu fyri 2.500 kr.
*Tlf. 504014*

**TIL SØLU**
Nokia 8310 200 kr. Nokia 6210 200 kr. Nokia 3310 við 9 eyka cower 300 kr.
*Tlf. 318428/257874*

**JÓLABORÐHALD**
Leygarkvøldið 4. desember verður jólaborðhald í Roynhøllini. Forrættur: Karrysúpan við rækjum. Høvuðsrættur: Buffét við m.a. stoktum lambskjøti og fleskasteik við øllum, sum hoyrir til. Omaná: Rísdessert. Eftir borðhaldið er almennur dansur, har Strange Fruit spælir Kostnaður fyri alt tiltakið; 250 krónur. Kostnaður bara fyri dansin: 100 krónur. Tekning í seinasta lagi mikudagin 1. desember.
*Royn*

**TIL SØLU**
M.C. lyftari til sølu, árg. 2004.
*Tlf. 212322*

**GULDHALSKÆDE**
til mand, 14 krt. elegant ankerkæde, 50 cm. Vægt 50,9 gr. sælges for 4.500,-
*Tlf. 271827*

**RESTPARTÍ**
Rullir á 25 mtr. maskinflættað 50x50 mm, galv./pvc, hædd 2 mtr. stólpar galv. T-profil 50/6 mm longd 3 mtr.
*Tlf. 315600*

## HEILSANIR



**Góða Linda**
Hjartaliga tillukku við 7 ára degnum 9. nov. og alt tað besta í framtíðini.
**Ynskja mamma, babba og Teitur**



**Góða fitta Henny**
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum 6. nov.
**Bestu ynskir frá ommu og abba á Strondum**



**Góði abbin**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum sunnudagin.
**Heilsan frá Michella og Mathias**



**Góða mamma**
Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum í dag. Takk fyri at tú altíð ert so góð ið meg.
**Ynskir Markus**



**Góði Oddur**
Hjartaliga tillukku við 9 ára føðingardegnum í morgin 7. nov. Alt tað besta verður ynskt tær.
**Mamma, babba og Ó. J.**